# Fólkið mintist Auken

**Plásstrotið inni í kirkjuni á Christiansborg forðaði ikki fólkinum í at minnast Svend Auken á teirra egna hátt í kirkjutúninum mitt í Keypmannahavn í gjár**

REPORTAGA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Umboð úr sosialdemokratisku lokalfeløgunum stóðu við hvør sínum reyðum flaggi á trappuni til Slotskirkjuna*

Tað var ikki pláss fyri teimum í Christiansborgs Slotskirke - teimum fleiri hundrað, sum stóðu eftir, tá dyrnar inn til kirkjuna vórðu latnar aftur neyvt klokkan 11.00 fyrrapartin í gjár. Onkursvegna tóktust tey heldur ikki at hava væntað sær sess í fínu kirkjuni. Og tey varnaðust næstan heldur ikki politistarnar, sum royndu at stúgva tey meir saman, so tey ikki stóðu beint í allari býarferðsluni. Teirra oyru vóru longu vend móti hátalararnum og við eygunum í lítla sangheftinum, tey høvdu fingið, sluppu tey kortini at vera við í minningarhaldinum fyri teirra stóru fyrimynd og sosialdemokratiska oddamanninum Svend Auken.

Kring allan býin sæst Dannebrog á hálvari stong, men allan vegin upp gjøgnum kirkjutrappurnar standa ernir menn við reyðum fløggum, sum reisa seg hægri og hægri. Ein eldri maður í slitnum bláum frakka heldur fast um flaggstongina við aðrari hondini, meðan hann festir sær í við hinari. Frammanfyri mær roynir ein maður í svartari T-skjúrtu at finna rætta sálmin í sangheftinum. Á rygginum stendur "Skal du passe dig selv, eller skal vi passe på hinanden?" Júst sum hann toyggir seg fyri at síggja betri, steðgar hann á, so hann ikki traðkar á reyðu rósuna, sum liggur við síðuna av eini konu, sum hevur sett seg á fortovið. Hon syngur longu hart við "Hils dig frelser og forsoner", sum nú rungar úr hátalaranum.

So hoyrist røddin á góða vinmanninum hjá Svend Auken og biskoppinum í Århus, Kjeld Holm. Hann syrgir um sín vin og harmast um stóra politikaran, sum fór alt ov tíðliga. Hann roynir at seta orð á nívandi missin við at tríva í eina yrking hjá skaldinum Tom Kristensen, um at tað er tann, sum hevur megina at tola og bera, sum kann fylla eitt pláss millum tey stóru. Ein slíkur var Svend Auken, sigur vinmaðurin; hann átti eginleikan at tola, ikki fyri egnan vinnings skuld men fyri sakina. Tí tað altíð var okkurt, sum var týdningarmikið, okkurt, sum ikki kundi bíða.

Maðurin í svørtu T-skjúrtuni nikkar stillisliga.

Eina løtu ger brummið frá bilum og bussum tøgnina ullinta, til klára røddin hjá forkvinnuni í sosialdemokratiska flokkinum mest sum fær fjøldina at hvøkka við. Eisini Helle



*Eisini politisk umboð úr Føroyum vóru at síggja í fylginum. Her eru tað John Johannesen og Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum*




*»Skal du passe dig selv, eller skal við passe på hinanden« Hvør á sín hátt mintust fólk á gøtuni Svend Auken*